FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Frágreiðing
## um broytingaruppskot landsstýrisins og dagførda inntøkumeting til uppskot til
## løgtingsfíggjarlóg fyri 2019

Landsstýrið sendir hervið fíggjarnevnd Løgtingsins broytingaruppskot landsstýrisins og dagførda inntøkumeting til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2019.

RLÚ I úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019 fer við hesum, úr avlopi á 403 mió. kr. upp í avlop á 434 mió. kr., t.e. ein betring av RLÚ I úrslitinum á 31 mió. kr.

Broytingaruppskot landsstýrisins og dagførda inntøkumetingin frá landsstýrinum til fíggjarlógaruppskotið fyri 2019 hevur samanlagt hesa ávirkan á fíggjarlógina fyri 2019:

| | **mió. kr.** |
|---|---:|
| **RLÚ I úrslit í fíggjarlógaruppskotinum 2019** | **403,1** |
| Broytingaruppskot landsstýrisins - rakstur | -16,5 |
| Broytingaruppskot landsstýrisins – løgur og løgustuðul | 17,0 |
| Dagførd inntøkumeting | 30,5 |
| **Dagført RLÚ I úrslit fyri 2019** | **434,1** |

Sum vanligt er, eru broytingar í metingini av fleiri játtanum frá september, tá fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram, til desember. Hesar eru partar av broytingaruppskotinum. Størstu broytingarnar í broytingaruppskotinum eru orsakað av, at allar lønarlíknandi almannaveitingar frá 1. januar 2019 fáa lagt eftirlønargjald omaná. Hetta er liður í pensjónsnýskipanini og fer at økja eftirlønaruppsparingina hjá fólki, ið fáa lønarlíknandi veitingar eitt tíðarskeið í lívinum. Eisini vil økta pensjónsuppsparingin styrkja langtíðar haldførið hjá føroyska búskapinum og vælferðarsamfelagnum.

Millum broytingarnar eru hartil, at Familjuískoytið tillagað og betrað, soleiðis at barnafamiljur í fíggjarliga trongum korum fáa fíggjarligan styrk. Játtan verður eisini veitt til umsiting av heimtøku av kortmyndugleikanum, økta játtan til Hagstovuna at gera hagtøl viðvíkjandi teimum 17 heimsmálunum hjá ST, og játtan til talgilding av savnstilfari. Harafturat verður løgujáttan veitt til Tekniska Skúla í Klaksvík, Hvalastøðina við Áir, bakkaverju í Kirkjubø, Tjóðsavn Føroya og Skótadepilin í Selatrað. Harumframt fær Strandfaraskip landsins økta játtan. Samstundis eru fleiri játtanir lækkaðar vegna dagførdar metingar, eins og ávís sparikrøv verða sett til fyrisiting og stovnar.

Eftir broytingaruppskot landsstýrisins hækka rakstrarútreiðslur landsins samanlagt 2,9% frá 2018 til 2019. Av hesum 2,9% eru 1,4% vegna vanligan rakstrarvøkstur, meðan 1% er lønarvøkstur og 0,5% er vegna pensjónsnýskipanina, ið inniber økt inngjald frá landinum til Samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og at pensjón verður løgd afturat øllum lønarlíknandi almannaveitingum. Hetta verður mett at vera ein varligur rakstrarvøkstur, ikki minst sæð í ljósinum av, at samfelagið hevur søguliga stóran fólkavøkstur, og hetta setur krøv til tænastur til fleiri borgarar.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Broytingarnar í rakstrar- og løguútreiðslunum kunnu útgreinast soleiðis:

| | |
|---|---|
| Rakstrarjáttanir | +8,2 mió. kr. |
| Lógarbundið | +9,3 mió. kr. |
| Stuðulsjáttanir | -0,9 mió. kr. |
| Løgujáttanir og løgustuðul | -17,0 mió. kr. |
| Íalt útreiðslur | -0,4 mió. kr. |

Dagførda inntøkumetingin gevur samanlagt meirinntøkur á 30,5 mió. kr. í mun til fíggjarlógaruppskotið. Hetta er orsakað av, at nakrar inntøkur vísa seg at vera hægri ella lægri í 2018, enn mett varð, tá fíggjarlógaruppskotið fyri 2019 varð lagt fyri Løgtingið.

Inntøkurnar fyri 2019 verða tí tillagaðar samsvarandi. Størstu broytingar í inntøkunum fyri 2019 eru, at inntøkurnar frá vanligum landsskatti verða mettar at verða 72 mió. kr. hægri, og at inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum verða mettar at verða 45,5 mió. kr. lægri.

Gjørt verður eisini vart við, at grundarlagið fyri metingini av inntøkum frá avgjaldi á fiskatilfeingi framhaldandi er í samsvari við uppskotið til veiðugjaldslóg, sum er til viðgerðar í Løgtinginum í løtuni. Tað ber ikki til at gera nýggjar metingar, fyrrenn Løgtingið hevur endaliga tikið støðu til, hvørji veiðigjøld vera galdandi fyri 2019. Hetta merkir, at tað er ein óvissa í inntøkunum í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019. Harumframt er lógaruppskot lagt fyri Løgtingið um at einskilja Posta. Men til tess ikki at ávirka prísásetingina av Posta, eru inntøkur frá einskiljing av Posta ikki tiknar við.

Tinganes, 7. desember 2018

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason